# Fjølbroyttari inntøkur skulu til

**Skal tað bera til hjá útjaðarakommunum at hava eina javna inntøku, skulu inntøkukeldurnar spjaðast yvir fleiri øki. Fleiri almennar inntøkur skulu fáast, so ikki alt byggir á fiskivinnuna**

ØKISMENNING
*Edvard Joensen*



*Fundarfólkið harmaðist um, at fiskiloyvini verða seld av oynni*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Á Sandi:** Útjaðaraøkini liva fyri stóran part av fiskivinnuni, og hava eina ov einstáttaða inntøku. Skjótt er, at alt koppar, um eitt nú fiskivinnan verður fyri bakkasti. Tí má eitt breiðari inntøkugrundarlag fáast.

Á økismenningarfundinum á Sandi mikukvøldið royndu politikkararnir, sum sótru við pallborðið at koma við ymsum uppskotum til loysn á teimum trupulleikum, sum útjaðaraøkini hava. Men tað tóktist tungt at koma út til fundarfólkið við boðskapinum.

Tá til dømis borið varð fram, at eitt samfelag, sum bara tosar um fisk, er eitt fátækt samfelag, var beinanveg onkur í salinum, sum hevði hug at mótmæla.

Hendan reaktiónin var í grundini eitt sera gott dømi um, hvussu inngrógvin fiskurin er í føroyinginum, og hvussu stutt hugflogið í grundini røkkur.

Tí tað, pallborðsluttakarin meinti við, var ikki, at vit ikki skulu veiða og arbeiða fisk. Men at vit eiga at finna okkum onnur bein at standa á eisini, so vit ikki verða púra avlamin, um hetta eina bein okkara brotnar.

## Fjølbroyttari samfelag

Jóannes Eidesgaard vísti á, at 43 prosent av allari inntøku í Sandoynni stava frá fiskivinnuni. Tí er oyggin sera sárbær, um eitt hóttafall kemur á fiskivinnuna.

Tí er tað ikki nøktandi bara at siga, at vit skulu hava nýggj virki, hóast vit skulu tað, segði hann.

Vit mugu hava eitt nú almennar tænastur út á økini, so inntøkurnar verða javnari býttar.

Í Havn stava 40 prosent av inntøkunum frá almennar lønir, meðan bara átta prosent koma frá fiskivinnuni.

Vit mugu bróta vanan við at leggja alla fyrisiting í Havn. Eitt nú tann nýggja oljufyrisitingin átti at verið løgd onkra aðrastaðni segði Jóannes Eidesgaard.

Hann helt tað vera vanahugsan, at leggja oljufyrisitingina í Tórshavn. Hetta er nýggjur stovnur, sum ongar traditiónir hevði í Havn. So hví ikki byggja hann upp aðrastðani? Heimurin er tódnaður munandi við Internetinum, og ein fyrisiting kann tað sama liggja í einum útjaðarøki, sum í Havn. Hon kann eins væl byggjast upp av Sandi sum úr Hoyvík, vildi hann vera við.

Jóannes Eidesgaard segði frá, hvussu tað gekk í Svøríki, tá stjórnin gjørdi av at flyta umsiting úr Stockholm.

Tað var eitt øgiligt rok beinanveg, tað frættist, at talan var um flyting. Fyrst og fremst sjálvandi frá teimum, sum tað rakti. Men har hendi tað, tá aðalstýrini vórðu flutt, at trýstið á Stockholm minkaði, umsitingin gjørdist dýrari, men trivnaðurin í teimum býum, har tey vórðu løgd, vaks munandi.

Jóannes Eidesgaard segði, at hann vil hava lagt nøkur stýri út á økini. Tá má vera stýri, tí deildir eru ikki nokk, tá allar tær tungu avgerðirnar kortini liggja í Havn. Tað verður eitt gníst beinanveg, men fleiri fara tó at gleðast seinni. Tað ræður um at hava rygg.

## Fiskiloyvini

Tað er greitt, at tá tosað verður um økismenning í Føroyum, verður ofta hugsað um fiskivinnu. Fiskivinnan er sterk og at kalla einaráðandi í hesum landinum.

Tí er tað eisini, at onkur politikkari hevur ta meting, at eitt nú almennar tænastur eiga at leggjast út á økini fyri at fáa fleiri fastar lønir og størv, sum seta krøv til tann, sum røkir tey. Soleiðis hevði borið til at fingið útbúgvið fólk av staðnum aftur til heimbygdina og ikki bara til Havnar, tá tey koma aftur uttanlendis við sínum útbúgvingum.

Á økismenningarfundinum á Sandi varð komið inn á, at bara trý fiskiloyvi til størri skip vóru eftir í Sandoynni, og varð hetta mett sum ein hóttan móti fiskivinnuni á staðnum.

Tað varð beinanveg hildið upp í móti, at tað gjørdi ikki so nógv nú, tí nú varð alt selt um uppboðssølu kortini, og so kundi fiskurin bara koma aðrastðani frá.

Men Egil Olsen, stjóri á Sandoy Seafood, sum var á fundinum, helt kortini, at tað hevði rættiliga stóra ávirkan, hvar fiskiloyvini lógu. Hann nevndi skip, sum selt varð av oynni fyri tíð síðan, og sum teir ikki høvdu sæð aftur.

Grundin var einføld, helt hann. Tá menn koma aftur av túri, vilja teir fegnir vera heima, og tí verður alt gjørt fyri at sleppa at landa har, skip og manning búgva. Tað er bara ein sannroynd, staðfesti Egil Olsen og tók undir við teimum, sum halda, at manglandi fiskiloyvi kunnu vera ein ávís hóttan móti útjaðaraøkjunum.



*Verður kaffi at fáa í steðginum? Tað kundi Hentze*

*Mynd. Edvard Joensen*



Jóannes Eidesgaard:

# Brúk fyri landsstýrismanni í innanlandsmálum



*Formaður Javnaðarfloksins heldur, at ein umsitingarlig broyting í Tinganesi kann bjarga útjaðaranum. Hann skjýtur upp, at vit fáa nýtt landsstýrismannaembæti, nevniliga landsstýrismann í innanlandsmálum*

**Trupulleikarnir í útjaðaranum eru stórir. Tí heldur formaður Javnaðarfloksins, at føroyingar eiga at fáa ein landsstýrismann í innanlandsmálum at taka sær av millum annað kommunumálum og útjaðaramenning**

ÚTJAÐARAMENNING
*John Johannessen*

Føroyar skulu hava ein landsstýrismann, ið burturav tekur sær av kommunumálum og viðurskiftunum í útjaðaranum.

Hetta heldur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins.

– Við gongdini í dag verður útjaðarin alsamt veikari, og vandi er fyri, at Sandoyggin og Suðuroyggin eins og útoyggj-arnar heilt fara at detta niðurímillum í samfelagsmenningini. Tí er neyðugt at nýta orku til at venda gongdini, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Ábyrgd er neyðug

Í løtuni er tað løgmaður, sum umsitur kommunumál og útjaðaran. Hetta heldur Jóannes Eidesgaard vera skeivt.

– Sambært stýrisskipanini skal løgmaður umsita uttanlandsmál, vera fyrisitingarligur leiðari og annars hava eftirlit við, at teir ymisku landsstýrismenninir umsita málsøki síni á fullgóðan hátt. Men tá løgmaður sjálvur umsitur kommunumál og útjaðaran, er eingin, sum kann hava eftirlit við hesum málsøkjum, ger Jóannes Eidesgaard greitt.

Tí heldur Jóannes Eidesgaard tað vera heilt náttúrligt, at ein landsstýrismaður verður settur burturav til hesi málsøki. Og so kann løgmaður hava eftirlit við, at landsstýrismaðurin umsitur øki síni á fullgóðan hátt.

## Sjálvstýrismál til løgmann

Hóast ábyrgdin av uttanlandsmálum hongur saman við løgmansembætinum, hava vit í dag ein landsstýrismann, sum hevur ábyrgdina av sjálvstýrismálum.

Hetta er eitt málsøki, sum Jóannes Eidesgaard heldur hanga tætt saman við uttanlandsmálum, og tí heldur hann, at løgmaður eigur at umsita hetta málsøkið.

Høgni Hoydal, sum er landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, er eisini landsstýrismaður í lógarmálum. Jóannes Eidesgaard ímyndar sær, at landsstýrismaðurin í innanlandsmálum í eini komandi samgongu eisini er landsstýrismaður í lógarmálum.

Jóannes Eidesgaard sigur, at Javnaðarflokkurin umhugsaði hetta, tá Fólkaflokkurin setti seg í samband við Javnaðarflokkin undir seinastu samgongukreppu. Og Jóannes Eidesgaard ger greitt, at hetta helst eisini fer at verða eitt krav, um Javnaðarflokkurin fer í samgongu eftir komandi løgtingsval.

# Fara at kanna skjøl eystanfyri

**Løgmaður hevur sett Bent Jensen, professara við lærda háskúlan í Odense at grópa í skjølum eystanfyri, ið kunnu geva eina mynd av, hvussu Sovjetsamveldið og Varsjavasamgongan sóu trygdarpolitisku støðu Føroya**

HERNAÐARKANNING
*John Johannessen*

N
ú skal sambandið millum føroyar og londini eystan fyri undir kalda krígnum kannast.

Fyri hálvum ørðum ári síðani fingu vit sokallaðu Svørtubók, sum lýsir hernaðarligu støðu Føroya í sambandi við Danmark og USA undir kalda krígnum.

Men løgmaður vil eisini hava sambandið við londini eystanfyri lýst. Tí hevur hann sett danska professara, Bent Jensen, frá lærda háskúlanum í Odense á uppgávuna.

Arbeiðssetningurin hjá Bent Jensen verður hesin:

1. At lýsa trygdarpolitisku støðu Føroya í kalda krígnum, sum Sovjetsamveldið og tess sameindu (Varsjavasamgongan) mettu hana.
2. At lýsa hernaðarligt virksemi hjá Sovjetsamveldinum og tess sameindu á landi í Føroyum, á føroyskum havleiðum og í føroyskum loftrúmi.
3. At lýsa, í hvønn mun Sovjetsamveldið og tess sameindu høvdu eina serstaka hernaðarliga ætlan (strategi) mótvegis Føroyum, eins og tey eyðvitað høvdu mótvegis Danmark.
4. At lýsa fregnarvirksemið hjá Sovjetsamveldinum og tess sameindu í Føroyum umframt uttanlands Føroyum viðvíkjandi.
5. At lýsa, í hvønn mun føroyingar, føroysk feløg og føroyskir myndugleikar luttóku tilvitað og/ella ótilvitað sum umboðsmenn, njósnarar ella loyniumboð hjá Sovjetsamveldinum og tess sameindu.
6. At savna saman viðkomandi skjalatilfar í skjalasøvnum hjá Sovjetsamveldinum og, um umstøðurnar tala fyri tí, eisini í Eysturtýsklandi og á NATO høvuðsstøðini í Brússel til tess at greiða tann yvirskipaða setningin.

